## Prince Edward Island

Prince Edward Island er kanadisk oyggj, har tað búgva 140.000 fólk. Hetta gera oynna til aðra av teimum fólkaríkastu oyggjunum, sum taka lut á Oyggjaleikum. Oyggin fekk navnið eftir Edwardi prinsi, sum livdi frá 1767 til 1820 - hann var fjórði sonur hjá George 4. Og Victoriu drotning. Málið á Prince Edward Island er enskt, og høvuðsstaðurin er Charlottetown.



## Rhodos

Við sínum sløku 120.000 íbúgvum telist Rhodos millum størru oyggjarnar, sum taka lut á Oyggjaleikum. Rhodos hoyrir til Grikkaland, og fyri tveimum árum síðani var júst Rhodos vertur fyri Oyggjaleikunum. Tá fingu føroyingar sítt besta úrslit nakrantíð. Størsti býur á Rhodos er Dodecanese, har tað gúvar góð 50.000 fólk. Á Oyggjaleikunum seinast vann Rhodos næstfelst heiðursmerki – tey gjørdust 59 í tali, fýra fleiri enn Føroyar vunnu.



# Egilsson er nú útbúgvin

**20 ára gamli Ragnar Egilsson fer í komandi viku at taka lut á Oyggjaleikum fyri fjórðu ferð. Men hóast sín unga aldur er hann ikki við fyri at læra – nú skal hann gera seg galdandi**

uni@sosialurin.fo



Uni Holm Johannesen

Hann er nú 20 ára gamalur. Ragnar Egilsson. Havnardrongurin, sum við tíðini er vorðin ein av okkara fremstu borðtennisleikararum. Og dugnaligu evnini eru eyðsýnd. Í komandi viku fer hann at taka lut á Oyggjaleikum fyri fjórðu ferð, hóast sín unga aldur. Og hesaferð er hann álitið. Álitið í føroyska borðtennisheiminum, sum skal standa fyri besta føroyska avrikinum.

### Ikki lærlingur longur

Føroyska borðtennislandsliðið, sum í komandi viku skal dystast við aðrar oyggjarbúgvar, er sera óroynt. Ættarliðsskifti hevur verið, og nú skulu ungu menninir av álvara royna seg. Kjartan Eli Hentze, sum hevur verið drúgvur, er givin, og royndi Thomas Rasmussen hevur valt aðrar leiðir. Miðalaldurin er tí um 18 ár, og Ragnar Egilsson verður tískil mettur sum ein av teimum royndu hesaferð. Og hann er fullgreiður yvir sína støðu.

- Eg eri ikki við fyri at læra longur. Undanfarin ár havi eg luttikið í royndini at menna meg. Men hesaferð skal eg gera meg galdandi. Og tað er sanniliga mín vón, at eg fari at standa meg væl. Eg havi vant sera miðvíst seinastu torført.

- Vit eru í øllum førum ikki favorittar. Tað er fleiri nøvn, sum eg góðar møguleikar í double-kappingini. Men tað er treytað av lutakastinum og øðrum, slær Ragnar Egilsson fast.




- Eg eri ikki við fyri at læra longur. Undanfarin ár havi eg luttikið í royndini at menna meg. Men hesaferð skal eg gera meg galdandi

### Eru væl fyri

Óroyndu føroysku borðtennisleikararnir eru sera væl fyri, nú Oyggjaleikirnir eru á breddanum. Tey hava fyrireikað seg væl, og serliga hevur Ragnar Egilsson gjørt nógv burturúr.

- Sjálvsagt havi fyrireikingar verið eitt sindur øðrvísi enn til aðrar kappingar, tí Oyggjaleikirnir hava sera stóran týdning fyri føroyskar borðtennisleikarar. Eg meti, at hetta eru bestu fyrireikingarnar, eg havi verið við til. Norski landsliðsvenjarin og sonur hansara, sum er yrkisleikari, hava verið og lagt okkum lag á, og millum annað hava vit verið á venjingarlegu í Grønlandi. Vit hava vant óteljandi tímar um vikuna, so vit kunnu ikki seta fingurin á fyrireikingarnar, sigur Ragnar Egilsson.

## BORÐTENNIS

Ættarliðsskiftið hevur verið á borðtennisliðnum, sum skal umboða Føroyar á Oyggjaleikum. Burtur eru royndir spælarar sum Kjartan Eli Hentze og Thomas Rasmussen, sum áður hava verið við at tryggja føroysk heiðursmerki í borðtennis. Hesaferð er miðalaldurin um 18 ár, og tað hevur eisini við sær, at hesaferð skulu spælararnir fyrst og fremst hugsa um at menna seg.

## FAKTA

**Hesi eru við á borðtennisliðnum á Oyggjaleikum**

Ragnar Egilsson
Rói Agnarsson
Fróði Jensen
Hallur Thorsteinsson
Sheila Strøm
Rakul Mikkjalsdóttir
Marin í Dali
Henriette Nielsen